NVD *Rit*

# Túrfrágreiðing

## Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka

## 22.- 31 mars 1996

*Cruise report: Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*

*March 22$^{th}$- 31 1996*

Eyðfinn Magnussen



SERRITGERÐ Thesis

**TØKNIFRÁGREIÐING Technical Report**

UNDIRVÍSINGARTILFAR Teaching Material

UPPRIT Notes

NVD*Rit* 1996:1

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN Faculty of Science and Technology
FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA University of the Faroe Islands

Heiti / Title **Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka**
**22.- 31. mars 1996**
*Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*
*March 22$^{th}$ – 31$^{th}$ 1996*

Høvundur / Author **Eyðfinn Magnussen**

Ritslag / Report Type Tøknifrágreiðing/*Technical Report*

NVD*Rit* 1996:1
© Náttúruvísindadeildin og høvundurin

Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

**Fólk við frá FRS:** Rógvi, Bárður og Eyðfinn

**Ábyrgd:** Eyðfinn Magnussen

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var, at fáa eitt mát fyri nøgdini og biologiini, serliga vøkstri og føði, hjá teimum týdningarmestu fiskasløgunum, ið finnast á Føroyabanka. Trolað var eisini á, Lúsa- og Bill Bailey´s banka og í dýpinum millum Bill Bailey og Føroyabanka.

Endamálið við túrinum var rokkið, tó vóru í minna lagi av magum (serliga upsa) tiknir á Føroyabanka. Hetta komst av, at ov lítið av fiski var fingið.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m, CTD og WP2 glúpur.

**Um túrin:** Farið var av Havnini 22/3 kl.21.00. Fyrsta hálið var á Føroyabanka 23/3 kl. 10.22. Seinasta hálið var 31/3 kl. 08.41. Túrurin samsvaraði við ætlanina.

**Prøvataking:** Á Føroyabanka vóru tiknar 30 trolstøðir. Tilsamans 294 magar vórðu tyknir:

| | | |
|---|---|---|
| Toskur | | 26 |
| Hýsa | | 97 |
| Upsi | | 48 |
| Gulllaksur | | 25 |
| Kalvi | | 8 |
| Longa | | 5 |
| Brosma | | 2 |
| Kongafiskur, | Lítli | 10 |
| | Stóri | 5 |
| | Trant | 5 |
| Havtaska | | 5 |
| Mathøgguslokkur | | 23 |
| Havmús | | 21 |
| Knurrhani | | 14 |
| ==================== | | |
| Tilsamans | | 294 |

Umframt hettar, vóru uml. 100 toskar frystir til Fiskaaling. Har skulu teir máta longd, vekt, livir-index, gonadu-index og gera morfometriskar mátingar. Nytrarnar verða eisini tiknar av hesum fiskinum. Fiskirannsóknarstovan fær hesi úrslitini.

Fylgjandi tal av nytrum vórðu tiknir á túrinum:

| | |
|---|---|
| Toskur | 184 |
| Hýsa | 203 |
| Upsi | 71 |
| Gulllaksur | 81 |
| Glýsufiskur | 65 |
| Kalvi | 5 |
| Silvur murtur | 29 |
| Longa | 14 |
| Brosma | 4 |
| ======================== | |
| Tilsamans | 656 |

Á Føroyabanka vóru tiknar 12 CTD og WP-glúp støðir. Av misgáum vórðu tær flestu glúpstøðirnar tiknar frá 100 m dýpi í staðin fyri á 50 m, sum vanligt er. Tær støðir ið vórðu tiknar á 50 m, var hettar viðmerkt á prøvafløskuna.

Á Lúsabanka, Bill Bailey´s banka og í dýpinum millum Bill Bailey og Føroyabanka vórðu tiknar ávikavist 6, 6 og 4 trolstøðir.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Farið verður undir at sortera magainnihaldið eftir páskir, hettar tekur væntandi 2 mánar. Nytrarnar verða lisnar eftir páskir. Hesi úrslitini skulu brúkast til stovnsmetingarfundin hjá ICES 24 mai.

Eyðfinn Magnussen
navn